# TILTØK

**Hebron, Argir**
Sunnudagin kl. 10.30 Morgunmøti, barnaansing er samstundis, kl. 12.15 er sunnudagsskúli.
Mánadagin kl. 19.00 Ungdómstiltak, sum verður annanhvønn mánadag og er ætlað ungdómi (5.-10.flokk).

**Meinigheitin í Hoyvík**
*upp á Brekku 3*
Í kvøld kl. 20 After Eight.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/ Jónhild og Samuel úr Ghana.
Mánakvøldið kl. 20.30 Bønarmøti.

**Samkoman Rhema**
*Staravegur 5*
Fríggjakvøldið kl. 20 byrjar JC-Teens – fyri ungfólk til og við 18 ár.
Sunnudagin kl. 11 Familjumøti. Øll eru vælkomin.
www.rhema.fo

**Adventkirkjan**
Leygardagin kl. 10 Barnabíbliutími og bíbliugransking. Evni: Jesus – okkara offur og okkara frelsa. Kl. 11 Gudstænasta, J. V. Danielsen.

**Lívdin**
*í Hoyvíkar skúla*
Sunnumorgunin á familjumøtinum kl. 10.30 talar Billy Hansen um evnið: Hví doyði Jesus? og á tilbiðjunarmøtinum kl. 12 talar Jógvan Zachariasen um evnið: Tey fimm endamálini – læran. Barnaansing er fyri børn undir skúlaaldri á báðum møtunuim. Sunnudagsskúlin er kl. 12. Drekkamunnur er millum bæði møtini.
***Úti á Fløtum***
Mánakvøldið kl. 20 Alfa-Beta skeiðið og týskvøldið kl. 20 samlast húsbólkarnir.
Heimasíðan: www.livdin.fo

**Meinigheitshúsið**
Fríggjadagin kl. 20 Møti – Bróðurringurin á havinum – við Margeir Toftegaard.
Leygardagin kl. 16.30 Bønarløta fyri kvinnur, kl. 19.30-22 Juniorhugni, kl. 20 Møti – Bróðurringurin á havinum – við Agnar Nielsen
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti – Bróðurringurin á havinum – við Jógvan Fríðriksson.

**Katólska kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Orðsinstænasta við kommunión í Kerit.
Hóskvøldið 4. september kl. 20 verður fyrsta Taizé-kvøld aftur í Kerit. Taize-kvøld (bønarstund við sálmasangi úr Taizé) í bønarrúminum hjá Franciskanasystrunum, Varðagøta 16. Øll eru vælkomin.
Leygardag kl. 11.30 Orðsinstænasta við kommunión í Kerit.
Sunnudag kl. 11 Orðsinstænasta við kommunión í Mariukirkjuni.

**Filadelfia, Landavegur 22**
Í kvøld kl. 20 Ungdómsmøti., Í morgin kl. 17 Landsbøn.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti v/ Tummas Jacobsen kl. 11.30 Barnagudstænasta, kl. 18 Evangel. møti v/ Preben Hansen og Jenis av Rana (møguleiki er fyri forbøn, fyri tey ið ynskja tað).
Mánakvøldið kl. 20 Bønarskúlin.
www.filadelfia.fo

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Hósdag kl. 20 Heimaforbundið.
Sunnudagin kl. 11 og 18 Møti, major Kai Clausen talar. Sunnudagsskúli kl. 14 og bøn kl. 17.30.
Mánadagin kl. 17 og 19 Skótamøti.

**Samkoman Immanuel**
Í kvøld kl. 20 Kongsins Herlið, 8 ár og eldri eru vælkomin.

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti og kl. 18 Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

**Kirkju- og missiónshúsið á Argjum**
Sunnukvøldið Møti v/ Petur Steingrund, Tórshavn.

**Vestmanna missiónshús**
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli kl. 19 Møti við Hjallgrim Davidsen, Jónhildu og Gulaki Hansen.

**Saron, Vestmanna**
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti v/ breyðbróting.
Mánadagin kl. 20 Bønarmøti.
Telefonandaktin 424741.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21 Opið hús við Leif Høj.
Sunnudagin kl. 17 Møti við Anniku Høj. Barnamøti kl. 17. Vælkomin í Kelduna.
www.keldan.fo

**Eftirkomarar úr Mirmansstovu, Eiði**
Í samband við føroyavitjanina hjá Wendy Allen, úr New Zealandi, abbadóttur Poul í Mirmansstovu, verður hugnaløta fyri eftirkomarar úr Mirmansstovu í skúlanum á Eiði leygardagin kl. 17.

**Thabor, Toftir**
Ungdómsmøti verður í kvøld kl. 20. Evni: Guðs leiðsla. Hjartaliga vælkomin.

**Betania, Skopun**
Sunnudagin kl. 18 Sjonvarpsmøti. Vælkomin í Betania.

**Missiónshúsið í Skopun**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn og lovsangur, kl. 18 Møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Mánadagin kl. 17 Barnaarbeiði 1.-5. fl.
Týsdagin kl. 19 Ungdómsurin 6. fl. og eldri. Hjartaliga vælkomin.

**Aglow, Sandoy**
Aglow møti verður í Samljóð, leygardagin kl. 20 vit vitjan av Lív og systrunum. Allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar.

**Missiónshúsið í Skálavík**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti, Regin Høgnesen talar. Essa Jacobsen úr Leirvík syngur.

**Soli Deo Gloria**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/ Kaj M. Michaelsen.
Mánakvøldið kl. 20 Meinigheitsfundur.

**Getsemane**
*á Brekku 19, Klaksvík*
Sunnumorgunin er morgunmøti kl. 11 (barnaansing er undir møtinum). Tú ert hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Ungdómsmøti verður fríggjakvøldið kl. 21.30. Pizzakvøld.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti við Ragnar Ludvig og Katrinu Bærendsen. Bønarmøti verður hálvan tíma áðrenn møti. Innsavnan verður til húsið. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Sjómanskvinnuringurin kemur saman týskvøldið. Allar kvinnur eru vælkomnar.

**Missiónshúsið í Vági**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti við Terja Nielsen og Mourits Viderø, Mourits syngur. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Sion, Vágur**
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, kl. 18 Møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Mánakvøldið kl. 21 Bønarmøti og Bønartænasta á tlf. 373777. Tú ert vælkomin at ringja, um tær tørvar forbøn.

**Betel, Vágur**
Sunnudagin kl. 11 Breyðbróting, kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. fundur. Ónsdagin kl. 20 Bønar- og Uppbyggingarfundur.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
*Mánadagin 1. september*
kl. 10 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 10-18 Myndaveving á loftinum. Seyma fýrkantar til teppir í kjallaranum
**Skulu vit fara ein túr til Hetlands?**
kl. 14-18 Kortspæl, landastrok, bobbspæl, telving, dart og onnur spøl
*Týsdagin 2. september*
kl. 10-12 Vit baka
kl. 10-11.30 Vit syngja, Jóhann R. Jacobsen. Øll eru hjartaliga vælkomin
kl. 14.30 Útlitini fyri vælferðarsamfelagunum. Hermann Oskarsson
*Mikudagin 3. september*
kl. 10-17 Ítriv í kjallaranum
**Komandi mikudag 10. sept. verður farið út til Nólsoyar kl. 9.30 og heim aftur kl. 16.30. Tilmelding 316491 mánadagin 8. sept. kl. 12.**
kl. 15 Vitja fornminnissavni í Brekkutúni
*Hósdagin 4. september*
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 14-17 Telduprát, Brandur Petersen
*Fríggjadagin 5. september*
kl. 10-17 Opið hús

*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Felagið Tórshavn – Gongutúrur**
Sunnudagin 7. sept. verður gongutúrur niðan á Tyril. Farið verður av Kunningarstovuni kl. 10.30. Miðal til tungur túrur. Havið heit og góð gonguklæðir og matpakka við. Tilmelding.

**Tilhaldið í Sandoynni**
Tilhaldið í Sandoynni byrjar nú aftur eftir summarfrítíðina. Opið er sum vanligt mánadag og mikudag frá kl. 14-17. Drekkamuður er at fáa báðar dagarnar.

**Dagtilhaldið í Vági**
er hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15 til 18. Øll eru vælkomin.

**Føroya Heimavirkisfelag**
Postadressa: J. Paturssonargøta 24, 100 Tórshavn.
Formaður: Óluva Vilhelmsen.
T-postur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Tlf. 322686 / 319629

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630. Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórsh. tlf. 319630/61 655400.

**NA (Anomymir narkomanar)**
Reinsaríið, Tórsgøta 5:
Fundur er hvørt sunnukvøld kl. 20.00 til 21.00.

**ACA**
(Adult children anonymous). Fundur fyri tilkomin, ið eru uppvaksin í alkoholiskum ella dysfunktionellum familjum er hvørt leygarkvøld kl. 20.00-21.30 á Tinghúsvegi 37, Tórshavn. www.aca-danmark.dk.
E-mail: acafaroeislands@hotmail.com

**AA-fundir í Havn**
**Tinghúsvegur 37**
Mánadag: kl. 20.00–21.00
Týsdag: kl. 20.00–21.15
Mikudag: Sporafundur kl. 20.00–21.00
Hósdag: kl. 20.00–21.00
Fríggjadag: kl. 20.00–21.00 og kl. 22.30–23.30
Leygardag: kl. 9.00-10.00 opin fundur. Kl. 17.00–18.00
Sunnudag: kl. 11.00–12.00.
Allir fundir eru roykfríir.
Heimasíða: http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

**Al-Anon**
Fundur fyri avvarðandi at alkoholikarum er hvørt týskvøld og hóskvøld kl. 20 í Al-Anon, Tinghúsvegur 37. Telefontíð er fríggja-, leygar-, sunnu- og mánadag frá kl. 19-21 á tlf. 508030.

## 90 ÁR

Mánadagin 8. september fyllur Thomasia Kjærbo, Sumba, 90 ár. Hon er stødd í Klaksvík.


Landsfelag Pensjónistanna

## Ársveitslan hjá Landsfelag Pensjónistanna

verður hildin á Hotel Føroyum, leygardagin 4. oktober kl. 18.00. Kostnaður kr. 200,- pr. luttakara. Lutaseðlar blíva seldir.

Tey, sum ætla sær á veitsluna, skulu tekna seg hjá sínum lokalfelag í seinasta lagi 24. september.

**Landsfelag Pensjónistanna**



## Lærarar til Hoyvíkar skúla

Søkt verður eftir lærara til restina av skúlaárinum 2003-2004 at undirvísa 16 tímar um vikuna. Lærari, ið kann undirvísa í dreingjaítrótti, hevur fyrimun.

Søkt verður eftir lærara at undirvísa 27 tímar um vikuna fyri lærara í barnsburðarfarloyvi.

Meira fæst at vita um størvini við at venda sær til Birgit Arge, skúlastjóra á telefon 315073

Umsóknir skulu sendast til:

**Hoyvíkar skúla**
Postrúm 3073
110 Tórshavn



## Bilur til sølu



Ein sera góður VW T4 bussur, 2.3 Diesel, frá feb. 1991 til sølu. Gev eitt boð.

**Hans Jákup, tlf. 219848**
**ref@royal-consul.fo**



veitst tú ikki tað?
Sosialurin




## FILMSTEIGURIN

# Blondinens Hævn 2

Tá Elle Woods (Reese Witherspoon) finnur útav, at mamma at hennara elskaða hundi ,Bruiser, er seld sum royndardjór til eitt stórt heilivágsfelag, kastar hon seg út í dystin ímóti nýtslu av royndardjórum, og verður alt fyri eitt koyrd frá sínum arbeiði sum ein ung lovandi framtíð í einum stórum sakførarafelagi. Líkaglað fer hon til Washington, slær seg saman við kongresslimi Rudd (Sally Field) og byrjar dystin.

Men hon finnur skjótt út av, at hetta als ikki er so lætt, og rennur seg alla tíðina ímóti lógarinnar múri. Henda stíva, politiska skipanin er als ikki klár til eina sum Elle Woods. Men sum vanligt fær hon uppá onkran máta byrja eina mótmælisrørslu og fullført arbeiði sítt.

Við leika eisini Jennifer Coolidge og Owen Wilson.





# Sindbad: Legenden fra de syv have

Gudinnan av Kaos, Eris, spælir sítt spæl við Sindbad. Proteus, barndómsvinur Sindbad, er varðmaður hjá dýrgripinum, Fredens Bog. Tá bókin verður burtur, fær Sindbad skyldina. Men Proteus veit, at Sindbad er sakleysur, og letur seg verða gísla, so Sindbad kann fara út og vinna bókina aftur frá Eris- sjálvt um hann verður hálshøgdur, um Sindbad ikki kemur aftur.

Men barndómurin er jú farin, og Sindbad vildi í roynd og veru svíkja vin sín... var tað ikki fyri unnustuni hjá Proteus, sum bæði er vøkur og viljasterk. Hon kemur við og skjótt flúgva neistar teirra millum. Sum um tey ikki høvdu nokk av øllum teimum ræðuligu forðingum, Eris leggur fyri teimum.

Nýggjur teknifilmur við øllum spennandi tilhoyri. Við danskari talu av millum annað Michael Carøe og Sofie Gråbøl.





Frumsýning
Fríggjadagin 05.09. kl. $21^{00}$ Fríggjadagin 05.09. kl. $23^{15}$
Leygardagin 06.09. kl. $21^{00}$ Leygardagin 06.09. kl. $23^{15}$
Sunnudagin 07.09. kl. $20^{00}$ Sunnudagin 07.09. kl. $22^{15}$

**Stórt úrval av DVD-filmum til sølu**

# HAVNAR BIO
P Tlf. 311956 P
www.bio.fo




Frumsýning
Fríggjadagin 05.09. kl. $17^{00}$ Fríggjadagin 05.09. kl. $18^{30}$
Leygardagin 06.09. kl. $17^{00}$ Leygardagin 06.09. kl. $18^{30}$
Sunnudagin 07.09. kl. $16^{00}$ Sunnudagin 07.09. kl. $17^{30}$
**Billettprísur: 45,- kr.**




Fríggjadagin 05.09. kl. $16^{30}$ Fríggjadagin 05.09. kl. $19^{00}$
Leygardagin 06.09. kl. $16^{30}$ Leygardagin 06.09. kl. $19^{00}$
Sunnudagin 07.09. kl. $18^{00}$




Fríggjadagin 05.09. kl. $22^{45}$ Leygardagin 06.09. kl. $22^{45}$
Sunnudagin 07.09. kl. $21^{45}$




Fríggjadagin 05.09. kl. $20^{30}$ Leygardagin 06.09. kl. $20^{30}$
Sunnudagin 07.09. kl. $19^{30}$